STUTT SAGT

## Til reiðar til sjálvmorð

Meiri enn hundrað menn og kvinnur gingu í gjár mótmælisgongu í iranska høvuðsstaðnum Teheran, har tey mótmæltu Vesturheiminum, samstundis sum tey søgdu seg vera til reiðar at virka sum sjálvmorðsbumbufólk fyri at verja heimlandið og islam, skrivar AP.

Mótmælisfólkini bóru tekningar av kistum við amerikanska, bretska og ísraelska flagginum. Slíkar mótmælisgongur hava verið rættiliga vanligar tey seinastu árini, men eygleiðarar siga kortini, at mótmælisgongan í gjár var ein greiður boðskapur til Vesturheimin um, at iranar eru til reiðar at stríðast fyri at varðveita ta umstríddu kjarnorkuverkætlanina.

– Hóttanin frá USA hevur givið okkum nógv størri undirtøku og sannført okkum um, at vit hava rætt. Vit eru til reiðar at stríðast ímóti teimum, um tað so kostar okkum lívið, segði ein av mótmælismonnunum við AP. Tað er ikki greitt, hvør skipaði fyri mótmælinum, men hildið verður, at tað var hernaðarligi felagsskapurin Basiji, sum fær stuðul frá stýrinum í Teheran.

## Góðtekur ikki atfinningar

Forsetin í Hvítarusslandi, Aleksander Lukasjenko, hevur enn einaferð víst, at hann góðtekur ikki atfinningar ímóti sær ella stjórnini.

Nú hevur hann biðið dómsvaldið hjálpa sær at steingja skrivstovuna hjá Helsingforsnevndini, ið er tann størsti mannarættindafelagsskapurin í Hvítarusslandi. Í einum drúgvum skrivi frá løgmálaráðnum stendur, at felagsskapurin er farin út um tær heimildir, sum hann hevur fingið frá myndugleikunum, og at hann eisini hevur brotið fleiri lógir.

– Stjórnin roynir at steðga tí seinasta lógliga mannarættindafelagsskapinum í landinum. Vit hava stalinistiskar tíðir í Hvítarusslandi, tí nú verða fólk ikki einans revsað fyri sínar gerðir, men eisini fyri sínar tankar, sigur Tatjana Protko í Helsingforsnevndini við vesturlendskar tíðindastovur.



*Aleksander Lukasjenko góðtekur ikki atfinningar.*

## Omman fiskaði ólógliga

Ein 66 ára gomul kvinna í norðurnorsku bygdini Varangerbotn fór seinasta vikuskiftið oman í eina á at vita, um sleingitráðan var í lagi, men tað skuldi hon ongantíð havt gjørt.

Alt vísti seg at rigga, sum tað skuldi, tá hon slongdi fyrstu ferð. Hon helt kortini, at hon skuldi royna eina ferð afturat, og tá tók. Tað vísti seg at vera ein laksur, og tá hann var fingin upp á bakkan, legði kvinnan hann í bilin og fór aftur til hús.

Lítla løtu seinni bankaði onkur á dyrnar heima hjá kvinnuni, og tá hon lat upp, stóðu tveir løgreglumenn uttanfyri. Teir høvdu fingið fráboðan um, at hon hevði fiskað ein laks uttan veiðiloyvi, og tí løgdu teir hald á tráðuna og laksin.

Sambært útvarpinum NRK ivast kvinnan ikki í, at tað var ein øvundsjúkur granni, sum hevði ringt til løgregluna. Hon sigur við útvarpið, at hon er til reiðar at taka við revsingini, um hon so skal í fongsul fyri ólógligan fiskiskap.

UTTAN ÚR HEIMI

# Politiskir fangar verða píndir til deyða í Burma




*Í Burma eru mótmælisgongur bannaðar. Her eru tað burmesar, sum búgva í Japan, ið mótmæla hernaðarstýrinum í heimlandinum. Kvinnan á myndini er andstøðuleiðarin Aung San Suu Kyi.*

*Mynd: Reuters*

**Síðani 1988 eru minst 127 politiskir fangar píndir til deyða undir tí harðrenda hernaðarstýrinum í Burma. Fleiri lond vilja hava málið fyri ST-trygdarráðið**

BURMA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er felagsskapurin Assistance Association for Political Prisoners (AAPP), sum í einari nýggjari frágreiðing avdúkar lagnuna hjá 127 politiskum fangum í Burma ella Myanmar, sum landið eisini verður rópt. Frágreiðingin avdúkar eisini, at meiri enn eitt túsund politiskir fangar sita í fongsli og kunnu fáa somu lagnu sum tey 127.

AAPP krevur, at trygdarráðið hjá ST viðger støðuna í Burma, og tað verður gjørt nú. Fyri átta døgum síðani var ST-varaaðslskrivarin í politiskum viðurskiftum, Ibrahim Gambari, í Burma, har hann hitti andstøðuleiðaran Aung San Suu Kyi, sum hevur sitið í húsavarðhaldi í 11 ár seinastu 17 árini. Verandi varðhaldsdómurin fer úr gildi í morgin, men eygleiðarar ivast ikki í, at hann verður longdur, so hon framvegis skal sita í húsavarðhaldi.

Síðani Gambari var í Rangoon, hava fleiri lond biðið hann greiða trygdarráðnum frá støðuni í Burma, og tey vesturlendsku stórveldini hava eisini hert trýstið á hernaðarstýrið. Men Kina og Russland eru ímóti, at ST-trygdarráðið skal viðgera spurningar um mannarættindi, og tí er lítið, sum bendir á, at nakað kemur burturúr har, skrivar Reuter.

– Kina roknar Burma sum ein part av sínum øki í Asia og er tí ímóti allari uppílegging, og fyrr enn Kina og hini grannalondini broyta hugsan, gerst einki, sigur leiðarin í politisku deildini hjá Amnesty International í Noregi, John Peder Egenæs, við Dagsavisen.

### Píning, morð og forfylging

Í frágreiðingini hjá AAPP eru skjøl, sum prógva, at minst 127 politiskir fangar eru píndir til deyða í Burma síðani 1988. Sagt verður, at tað er rættiliga vanligt at pína fangar undir avhoyringum, og at fleiri verða send í arbeiðslegur.

Í løtuni eru 1.156 politiskir fangar í landinum, og sambært frágreiðingini er vandi fyri, at allir verða píndir.

Ein amerikanskur felagsskapur, sum arbeiðir við viðurskiftunum í Burma, vil sambært AFP vera við, at minst 1.000 politiskir fangar eru deyðir í burmesiskum fongslum seinastu 18 árini.

AAPP vísir eisini á, at hernaðarstýrið kúgar ávísar minnilutar í landinum. Ta seinastu tíðina hava myndugleikarnir hert átøkini ímóti Karen-fólkinum, sum er ein av teimum størstu minnilutunum í Burma, og sum hevur stríðst ímóti hernaðarstýrinum. Bara ta seinastu vikuna eru umleið 15.000 fólk rýmd frá húsi og heimi, skrivar AP.

# Kann enda við 30 kjarnorkuveldum

– Heimurin er komin á eitt vegamót, har vit mugu taka støðu til, um vit skulu fara burtur frá kjarnorkuvápnum, ella um uppaftur fleiri lond skulu hava slík vápn.

Tað sigur stjórin í altjóða kjarnorkueftirlitinum, Mohammed ElBaradei. Hann sigur, at stórveldini noyðast at sleppa sínum kjarnorkuvápnum ella at góðtaka, at onnur lond royna at útvega sær somu vápn.

– Vit hava valið ímillum at fara burtur frá kjarnorkuvápnunum ella at góðtaka ein heim við 20–30 kjarnorkuveldum, sum John F. Kennedy spáddi í sekstiárunum, sigur ElBaradei.